JFK
Kósarbrúgvin 3
P.O. Box 56
FO-710 Klaksvík
Faroe Islands
Tel +298 409900
Fax + 298 409901
jfk@jfk.fo

Føroya Løgting
FO-100 Tórshavn

Klaksvík, tann 8. mai 2023

Hoyringsskriv til lógaruppskot um veiðigjøld

JFK var á fundi við fíggjarnevnd løgtingsins hin 28. apríl 2023 í sambandi við veiðigjøldini, eins og felagið áður hevur sent inn hoyringsskriv.

JFK skal niðanfyri taka saman um ta figgjarligu ávirkan, sum broytingin fær í sambandi við hesa ætlaðu lógarbroyting.

Veiðugjøld partrolarar og línuskip – eykakostnaður upp 9 mió. kr.
Tað eru ialt 6 partrolarar og 6 ísfiska-/frystilínuskip, sum eru knýtt at Kósavirkinum,

Øllum kunnugt hava partrolararnir havt vánaligan fiskiskap seinastu mongu árini, og tí hevur ískoytið frá makrelinum verið eitt tíðandi íkast til manning og skip, tá m.a. hugsa verður um árshýru.

Í 2022 var manningarpartur orsakað av makrelinum umleið kr. 85.000, og svarar hetta til umleið 22% av samlaðu árshýruni hjá t.d. Safir / Smaragd – um ein er við allar túrarnar!

Við støði í kvotunum, sum partrolararnir og línuskipini omanfyri høvdu í 2022, so svarar lógarbroytingin omanfyri til eina árliga meirútreiðslu fyri hesi skip upp á umleið 9 mió. kr. Um veiðigjald, sum ætlað,verður lagt á heimaflotan fær tað avleiðingar fyri manningarnar á hesum skipum, sum ikki hava hægstu árligu lønirnar. Makrelpengar hava verið ein kærkomin upphædd hjá manningini, og eru eitt týðandi íkast til raksturin hjá skipunum, soleiðis at tey hava kunnað hildið áfram at latið rávøru til Kósina og tey 150 fólkini, sum har virðisøkja botnfiskin undan Føroyum.

Fíggjarmálaráðið hevur hesa viðmerking til frammanfyristandandi: *Uppskotið hevur avleiðingar fyri heimaflotan og avleidda virksemið.*

JFK
Kósarbrúgvin 3
P.O. Box 56
FO-710 Klaksvík
Faroe Islands
Tel +298 409900
Fax + 298 409901
jfk@jfk.fo

Endamálið er,sum nevnt í viðmerkingunum omanfyri, at avtaka vinnustuðulin, sum verður latin gjøgnum ókeypis kvotur, sum flestu skip í heimaflotanum ikki fiska, men selja til nótaskipini uttan veiðigjald. Avbjóðingarnar hjá heimaflotanum eru stórar, flotin gevur sum heild ikki avlop og neyðugt er at gera tillagingar at betra um raksturin. Verandi stuðul er ikki egnaður til at røkka hesum endamáli, men hevur heldur við sær atvirksemi, sum ikki lønar seg og sum ikki er burðardygt, heldur fram.

Sagt við øðrum orðum eru boðini frá Fíggjarmálaráðnum – stongið Kósavirkið.

JFK- Barentshavið og meirkostnaður - 26 mió. kr.
JFK gjørdi í 2019 sáttmála um nýggjan Gadus.

Hetta varð gjørt við støði í teimum fyritreytum, sum tá vóru galdandi. Uppsett er niðanfyri metingarnar um árligu kostnaðirnar í 2019, og hvat teir vantandi vera í framtíðini – ein munur upp á 26 mió. kr.:

Mió. kr.	2019	Framtíðin	Meir-kostnaður
Renta og avdráttur	20.000	25.000	5.000
Veiðugjøld, JFK Trol	10.000	22.000	12.000
Íalt	**30.000**	**47.000**	**17.000**
Veiðugjøld heimaflotin	0	9.000	9.000
Í alt	**30.000**	**56.000**	**26.000**

Orsøkin til meirkostnaðin í rentu og avdráttum er tann, at rentan á heimsmarknaðinum er hækkað sera nógv seinastu tíðina.

Samlaði meirkostnaðurin er sera stórur í mun til tey úrslit, sum JFK konsernin hevur havt í tíðarskeiðnum 2017 til 2021:

JFK
Kósarbrúgvin 3
P.O. Box 56
FO-710 Klaksvík
Faroe Islands
Tel +298 409900
Fax + 298 409901
jfk@jfk.fo

TDKK	2021	2020	2019	2018	2017
Úrslit JFK	22.883	20.555	29.959	9.336	17.787

Vit vilja tí enn einaferð heita á Fíggjarnevndina um at broyta tað uppskot sum fyriliggur, so hetta ikki fær avleiðingar fyri okkara virksemi.

JFK P/F

Hanus Hansen,
Stjóri